einfaldari
- ger tað einfaldari

Juli/august 2011

# Summarsteðgur í Lívdini



*Ása og Erling Bech hugna sær í góðveðrinum sunnudagin 19. juni* — *Mynd: Tórvør Vang*

Eins og undanfarin ár fara vit aftur í ár at hava ein summarsteðg í Lívdini. Eingi møtir verða í Skúlanum við Løgmannabreyt sunnudagarnar 24. juli, 31. juli og 7. august. Fyrsta møti eftir summarsteðgin verður sunnudagin 14. august.

## Summar

Summartíð er. Flestu fólk eru farin í feriu ella eru ávegis í feriu, og nógv fara av landinum at ferðast. Onnur fara at ferðast ymsastaðni í Føroyum, og nøkur verða verandi heima við hús og fáa ymiskt frá hondini, sum hevur ligið á láni.

Hjá okkum menniskjum er neyðugt at hvíla av og á. Vit eru skapt í bílæti Guds, og longu í fyrsta kapitli í Bíbliuni lesa vit, hvussu sjálvt Gud hvíldi, tá Hann var liðugur við skapanarverkið. Í Markus 6, 31-32 lesa vit, hvussu Jesus tók lærisveinar Sínar burturfrá, so teir kundu vera einsamallir, hvíla seg eitt sindur og vera fyri seg sjálvan.

So at hvíla er bæði gott og neyðugt, og tað er eisini nakað, sum Gud ynskir, at vit skulu taka okkum stundir til.

Vit ynskja hervið øllum eitt sera gott summar, og vit gleða okkum til í august, tá vit øll hittast aftur frísk og væl úthvíld.

*Absalon Áargarð*

# Hendingar & tiltøk

### Lívdin 10 ár

Fríggjadagin 26. august fyllir Lívdin 10 ár. Í hesum sambandi er ætlanin at leiga Hoyvíks-høllina frá 26. til 28. august.




Ætlanin er at hava eitt stórt Alive-tiltak í høllini fríggjakvøldið. Leygarmorgunin verður “English breakfast” fyri allari samkomuni. Seinnapartin verður eitt barnatiltak, og um kvøldið verður eitt gallatiltak.

Sunnudagin seinnapart verður sjálvt føð-ingardagshaldið við einum stórum tiltakið í Hoyvíkshøllini.

### Zarepta tørvar matvørur

Summarlegurnar á Zarepta eru byrjaðar. Í hesum sambandi er møguleiki at lata vørur inn úti á Fløtum við Landavegin.

Vørurnar verða heintaðar av Zarepta-bussinum hvønn mikudag og sunnudag. Innlatingarfreistin er mikudag áðrenn kl 17.30 og sunnudag áðrenn kl 14.

Frá Zarepta verður sagt, at goymslurnar í løtuni eru rættuliga tómar. Tí hevði tað komið væl við, um fólk lata matvørur inn. Legurnar eru stórar, og tørvur er á øllum, bæði køkum, bollum og øðrum matvørum.

### UngLív farin í summarfrí

UngLív, sum eru farin í summarfrí, høvdu eina frálíka útferð oman fyri Kleynisvarða sunnudagin 19. juni. Byrjað verður aftur sunnudagin 21. august.



*Myndir frá útferðini eru at síggja á UngLív-bólkinum á Facebook*

## Fortel Gudi alt

Fortel Gudi alt, sum liggur tær á hjarta, sum ein, ið tømir sál sína fyri hjartavini sínum.

Sig honum frá trupulleikum tínum, og hann fer at troysta teg. Sig honum frá gleði tíni, og hann fer at gleðast saman við tær.

Sig honum frá tí, sum forargar teg, og hann fer at sigra á tí. Sig honum frá freistingum tínum, og hann fer at verja teg.

Sig honum frá hjartasárum tínum, og hann fer at hella av fløvandi olju síni í tey.

Sig honum frá líkasælu tíni um tað góða og áhugan fyri tí illa, og hvussu skjótur tú ert at snáva.

Sig honum, hvussu kærleikin til tín sjálvan forðar tær í at hugsa um onnur; hvussu tú í tíni sjálvfordøming eisini fordømir hini.

Sig honum frá, hvussu stoltleiki tín heldur tær burtur frá djúpum og sunnum samfelag við onnur menniskju.

Tá tú soleiðis útoysir tínar veikleikar, tørvir og trupulleikar, so verður tú ongantíð tómur fyri samtalur við Gud. Tú verður alla tíðina endurnýggjaður. Fólk, sum ongar loyndardómar hava fyri hvørjum øðrum, hava altíð nógv at tosa um. Teimum nýtist ikki at viga hvørt orð, tí har er einki at goyma – har er eingin ótti. Sæl og signað eru tey, sum hava eitt slíkt opið og inniligt samfelag við Gud.



*Francois Fénelon, katólskur prestur (1651-1715)*

** Sitatið eftir Francois Fénelon er úr taluni hjá Jógvani Zachariassen sunnudagin 5. juni, har evnið var: Bøn og bønarsvar. (Rómbrævið 15:22-33).*

## Tónamyndir

Mynd frá sunnudegnum 19. juni, tá Ólavur Jøkladal skipaði fyri tónlistaliga innslagnum Tónamyndir.



*Mynd: Tórvør Vang*

## Minibíbliuskúli og bønarmøti

Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður mini bíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti.




**Skráin fyri týskvøld í juli 2011**

Týskvøldið, 5. juli
Kyknubólkar (Lonin opin til bøn)

* Summarsteðgur.

Nærri verður lýst í kunningarritinum og á heimasíðuni www.livdin.fo, nær byrjað verður aftur við minibíbliuskúlanum og bønarmøtunum.

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 3. juli**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag: Siri & Cathrina
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Sigur Kristusar (Rómbrævið 16:20-23)
Talari: Jógvan Zachariassen


Siri & Cathrina

**Sunnudagin 10. juli**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag: Rachel Eysturtún
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Prís fái Gud (Rómbrævið 16:25-27)
Talari: Jógvan Zachariassen


Rachel

**Sunnudagin 17. juli**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Familjuløta: Stella og Petur Zachariassen
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Evni: Opið evni
Talari: Símun Absalonsen

**Sunnudagin 24. juli (summarfrí)**

**Sunnudagin 31. juli (summarfrí)**

**Sunnudagin 7. august (summarfrí)**


Símun

**Sunnudagin 14. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Opið evni
Talari: Gunnar Nielsen


Gunnar

**Sunnudagin 21. august**
Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: Kreativt innslag
Lovsongur og tala kl. 12.00: Evni: Tit hava hoyrt... (Matt. 5:20-47)
Talari: Jógvan Zachariassen

**Sunnudagin 28. august**
10 ára føðingardagshald í Hoyvíkshøllini


Jógvan

**Ungdómstiltøk:**
Alive: leygarkvøld kl. 21.00

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*